# HS Venjingarlegu 8 og 9 apríl

## 8 apríl

Páskamorgun var ikki eins og hinir, øll væl úthvíld av tí at venjingin byrjaði kl. 10. 00.Tá ið vit vóru vakt stóð góður morgunmatur klárur á borðinum. Óli hevði verið tíðliga uppi og gjørt okkum røregg og bacon. Tá ið øll vóru liðug at eta kom Óli fram við páskareggum til øll.

Síðani gekk leiðin i svimjihøllina har nógv gott var á skránni, millum annað venjing saman við SH (svimjifelag í Hafnarfirði), stafettir og spæl, til síðst var flogbóltur í vatninum, HS móti SH. Vit vóru bangin áðrenn vit skuldi byrja av tí vit hevði sæð tey eldru spælt dagin fyri og tey vóru sera góð, men so var ikki vit vunni stórt á teimum. ☺ Støðuna vita vit ikki, men har var stórur munur á. Men øll sluppu tó ikki undan svimjiprogramminum, men langt var tað ikki. Eftir flogbóltsdystin fingið vit enn eitt páskaregg, men ikki frá Óla, hetta var frá svimjifelagnum SH, onkur var so grummur eftir egginum so at Kristian Martin fekk sítt stjolið – og hann var ikki blíður.

Fari var ikki heim, leiðin gekk beint til Bláa Lónið at slappa av. Kl. 13.00 vóru vit frammi og fari var beint í tað heita vatnið har vit smurdi okkum inn í væl kendu móruna, meðan Sámal tók nógvar myndir av okkum og staðnum. Veðrið var heilt gott, sólin bakaði og øll fingið eitt sindur av farvu. Eftir at hava verið á staðnum í 2 tímar gekk leiðin heim aftur. Matur stóð ikki klárur á borðinum, tí Óli hevði eisini veri við í bláa lónið, men í staðin bleiv bestilt pizza tá ið vit komu heim.

Tá ið klokkan narkaðist 20.00 møttust vit niðri í lobbini, tí tá skuldi út at gangast, so øll ikki skuldi sita inni framman fyri telduni. Fari var oman at hyggja eftir Hørpuni, tíverri var hon stongt og tí kundi vit ikki inn at hyggja.

Hetta var tann avslappandi dagurin, við massar av hygg og annarleiðis máta at halda páskir uppá. Men tó skal sigast at ov nógv góðgæti hevur verið eti og nú er slutt við tí. ☺

## 9 apríl

Tá klokkan nærkaðist 7.00 byrjaði vekkarin at vekka. Sum hinir dagarnir skuldu vit sjálvi syrgja fyri at hava etið áðrenn bussarnir koyrdu.

Sum væl vandir hundar vóru Óli og Marius fyrstir at hoppa í hylin, meðan hini komu tvassandi aftaná.

Eftir programmi var svomið, fóru nøkur í fitness meðan onnur strekti út.

Tá vit komi heim, stóð breyð og døgurðarestir á borðinum, ikki var nokk av pasta til seinna bilin og tað var onkur sera illur um. Tá vit vóru liðug var farið inn á kømurini at slappa av, tí venjing var longu aftur kl 14.00.

Á veg út til svimjihøllina bleiv sagt farvæl til Sámal og Rúna tí teir skuldi heim aftur til Føroya. Ikki bara bleiv tað sagt farvæl, tí herfrá yvirtók Eyðun.

Mitt undir venjing fór brandalarmurin frá, men tað var ikki tí at eldur var í. Vaskikonan var so grumm eftir at gera reint at hon kom undir brandknøttin. Hetta var flent eit sindur eftir. Áðrenn fari var heim at eta var fari ein túr út í pottanir.

Enn einaferð stóð lekkur grýturættur á borðinum, klárur at eta. Sum hinir daganar smakkaði hann avbera væl.

Tíðliga var farið til songar, av tí kapping er í vikuskiftinum, og tí er umráðandi at fáa nokk av svøvni.

Heilsan Genturnar á kamari 301

Rutt, Lena og Kristina ☺

Myndir liggja á facebook og HS heimasíðuni ☺